tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Vælkomið ár 2000

Oddagrein

VIT hava nú gloppað dyrnar inn í ár 2000 og kaga innar í ta stóru óvissu, sum eitt nýtt 10 ár, eitt nýtt 100 ár og eitt nýtt 1000 ár hava at bjóða. Vit fara á hesum týðandi og lutvíst friðaliga vegamóti at ynskja øllum okkara viðskiftafólki og øllum Føroya fólki vælkomin inn í ár 2000 og ynskja øllum eina góða og trygga framtíð.

HVAT hevur so henda nýggja øldin at bjóða okkum - ella hvat hava vit at bjóða henni? Talan er nevniliga bæði um at taka og geva. Og grundarlagið undir hesum báðum fevnir um evni og førleika okkara at handfara tilfeingið, náttúruna og hvør annan rætt. Hvussu náttúran annars fer at bera seg at í framtíðini eru vit ikki harrar yvir at avgera. Tó so at vit eisini kunnu hava ávirkan á, hvussu Guds skapanarverk lagar seg. Og her kunnu vit bert sanna orðini hjá fyrrverandi fiskasølumanni í Sosialinum á nýggjárinum, har hann kemur við eini rættiliga álvarsligari og áhugaverdari áheitan á okkum føroyingar, nú farið verður inn í eina nýggja øld. Har appelerar hann til vit og skil og kenslur okkara um at geva einum reinum umhvørvi og einum skilagott troyttum tilfeingi 1. prioritet. Útvarpið hevði sera áhugaverda sending nýggjársdag um framtíðina á hesum klettum. Samanumtikið varð sendingin merkt av bjartskygni og varð víst á nógvar gongdar leiðir at vinna fólki og landi nýggj arbeiðspláss og inntøkur. Hinvegin varð kanska gjørt í so lítið burtur úr teimum vandum, sum eru/kunnu vera fyri framman. Nú er sjálvandi ilt at spáa um framtíðina, men kortini eiga vit at brúka nógva orku uppá at forða fyri teimum negativu avleiðingunum av framhaldandi virksemi á hesum oyggjum.

OG í báðum førunum - tá talan er um at síggja nýggjar møguleikar og at vera varugur við vandar - er brúk fyri góðum fólki við innliti og sunnum fornufti. Okkara politikarar eru settir til at umsita og stýra okkara ynskjum og krøvum til hvør annan og til umverðina sum so. Men teir hava brúk fyri serkunleikanum og eisini krittiskum og konstruktivum leikmonnum/fakfólki at vegleiða seg í menningini av samfelagnum. Vit eiga nógv góð fólk, men stóra kynstrið er at vilja og duga at brúka hesi mongu góðu fólk. Tað er at halda teimum til. Tað krevur, at vit leggja Jantelógina á hillina, at vit hyggja út um okkum sjálvi, at vit vísa øðrum við øðrvísi meiningum virðing osfr. Tað krevur so eisini, at hesi fólki kenna tað sum sína skyldu at geva sítt íkast til samfelagstjakið/menningina. Og tað krevur eisini, at vit geva pláss fyri sjónarmiðjum, sum ganga Róma beint ímót tvs. fólki, ið eru atfinningarsom móti tí etableraðu skipanini og teimum stýrandi á øllum hugsandi rókum. Í farna ári mistu vit tríggjar sera virknar samfelagskritikkarar og debatørar,nevniliga Tórmóð Dahl, John Smith og Karl Nolsøe. Allir vóru teir seregnir og mettir ójavnt at øðrum. Antin vit kundu taka undir við teimum ella ikki, so røktu hesir tríggir sína demokratisku skyldu, nevniliga við at brúka egnu evni, útbúgving og lívsroyndir til at tjakast um stórar og álvarsligar samfelagsspurningar. Teir tordu at seta spurningar og at koma við svarum, ið ikki altíð vóru so væl móttikin. Vónandi fara vit í hesi nýggju øldini eisini at seta við onnur, sum kunnu taka við eftir teir og fullføra teirra verk, ið hevði sum stevnu at byggja eitt enn betur samfelag. Her kunnu fjølmiðlarnir eisini vera við til at lyfta, og tað skal vera okkara vón, at lesarar okkara fara at brúka tann karm/forum, sum eitt nú Sosialurin hevur skapt.

Sosialurin

Eingin trupulleiki av 2000

Fyribils hava tær stóru telduskipaninar í Føroyum eftir øllum at døma klárað túsundáraskiftið við ein glans. Tilbúgvingin hevur loyst seg, sigur almenni ár 2000 bólkurin.

Hóast nógv var talað um tað frammanundan, so er enn eingin í Føroyum, ella aðrastaðn i í heiminum fyri tann skuld, sum hevur sæð nakað til 2000 trupulleikan, tíbetur

(tilvildarliga vald mynd)

DÁNJAL HØJGAARD

Føroyar sluppu um gáttina til 21. øld uttan at tað nervaði tær stóru telduskipaninar.

Elektron, SEV, Føroya Tele og teir almennu stovnarnir eru eftir øllum at døma slopnir snikkaleysir frá árskiftinum. Enn eru heldur ongar fráboðanir komnar um brek í stóru telduskipanunum í privata vinnulívinum.

Hetta upplýsir ár 2000 bólkurin undir landsstýrinum, sum hevur fylgt gonggdini í sambandi við túsundára skiftið.

Vóru tilbúgvin

Orsøkin til at fyritøkur og stovnar fyribils eru sloppin so snikkaleys er, at tey hava tikið 2000-trupulleikan í álvara og hava búgvið seg til ársskiftið, verður sagt.

– Tað hevur verið gjørt eitt stórt arbeiði at forða fyri 2000-trupulleikanum, staðfestir Hjørdis Gaard, samskipari í ár 2000 bólkinum.

Vanligt nýggjár

Størsti spenningurin hevur kanska verið um hvussu tað fór at gangast Elektron, sum avgreiðir lønarflytingarnar. Og sum hevur ment sína egnu telduskipan.

– Hetta ársskiftið hevur líkst einum og hvørjum øðrum ársskifti, og vit hava ikki staðfest nøkur ár 2000-brek, sigur Niels Christian Nolsøe, stjóri í Elektron.

Men allar súður eru ikki syftar enn. Í gjárkvøldi skuldu teldurnar á Elektron standa enn eina roynd, tí tá fóru fyrstu lønirnar gjøgnum skipanina. Og seinni í hesum mánaðinum og seinni í ár skulu teldurnar aftur standa sína roynd.

– Men vit hava longu roynt allar hesar koyringarnar, so tað er eingin grund, at halda at tað verður nakar trupulleiki.

– Skuldi kortini onkur lítil trupulleiki hent í kvøld, so er ikki sannlíkt at nakar fer at merkja nakað, segði Niels Christian Nolsøe á miðdegi í gjár.

Føroya Tele overvað

Sambært Hjørdis Gaard hevur telefonsambandið ikki verið nervað av 2000-trupulleikum.

– Einasti trupulleikin var, at millum kl. 00.10 og 00.25 nýggjársnátt var uttanlandstelefonin yvirbelastað, so at tað ikki fekst samband. Men tað var yvirbelastningur, leggur Hjørdis Gaard dent á.

Samskiparin sigur, at Føroya Tele hevur fyrst og fremst lagt dent á, at tryggja telefonsambandið. Harnæst, at teldurnar duga at halda skil á og skriva út telefonrokningarnar, tá tær koma fyri í næstum. Og eingin vandi skuldi verið fyri skeivum rokningum.

– Føroya Tele hevur kannað eftir, um avrokningarnar eru sum tær skulu vera, og higartil hava royndirnar verið í lagi, sigur Hjørdis Gaard.

Teldan vísti 1980

Á SEV hava teldurnar heldur ongar trupulleikar havt av ártúsundskiftinum, sigur Hjørdis Gaard, sum hevði samband við SEV nýggjársnátt.

Á Landsverksfrøðingsstovninum var tó onkur telda, sum ikki megnaði skiftið til 2000, sigur samskiparin. Men eftir øllum at døma var brekið lítið og lætt at rætta.

– Teldan vísti árstalið 1980. Har fór mann so bara inn í datoskipanina og trýsti 2000 í staðin, sigur Hjørdis Gaard.

Privata vinnulívið

Ár 2000 bólkurin undir landsstýrinum hevur eisini havt samband við privatar KT-veitarar. Og fyribils eru heldur eingi tekin um, at privata vinnulívið í Føroyum er nervað av 2000-trupulleikanum.

– Men enn er ov stutt fráliðið, at siga nakað við vissu. Flestu starvsfólkini eru ikki farin til arbeiðis fyrr enn í morgun. So er okkurt brek kemur tað kanska ikki til sjóndar fyrr enn seinni í vikuni, segði Hjørdis Gaard á miðdegi í gjár.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri sonur mín, pápi, abbi og bróðir okkara

HERLUF JOENSEN
ættaður úr Havn

andaðist í heiminum í Oslo 2. jóladag, 65 ára gamal.

Jarðarferðin verður fríggjadagin 7. januar kl. 9.45 í Østre Gravlund, Helsfyr, Oslo.

Fyri tey avvarðandi
Jona

Stjórin fer frá

Stjórin í Ferðaráð Føroya, Annika Wardum Joensen, hevur gjørt av at siga seg úr starvi

DAGFINN OLSEN

Útvarpið visti í gjár at siga, at stjórin í Ferðaráð Føroya hevur gjørt av at siga seg úr starvi. Einki var nevnt um orsøkirnar til, at hon hevur tikið avgerðina, men hon segði seg hava rokkið nøkur av teimmálum, ið hon setti sær, tá hon tók við starvinum sum stjóri á Ferðaráð Føroya.

Annika Wardum Joensen tók við starvinum, tá táverandi stjórin Johan Mortensen tók við starvi hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Annika Wardum Joensen sat í áramálsettum starvi, og gekk sáttmálin út seinni í ár. Men hóast hon hevur valt at fara úr starvinum í úrtíð, so hevur hon játtað at starvast á Ferðaráðnum eina tíð enn, so hon m.a. kann seta komandi stjóra inn í viðurskiftini.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Anniku Wardum Joensen í gjár.

Annika Joensen, hevur sagt seg úr starvinum, sum stjóri á Ferðaráð Føroya
savnsmynd

Fyrsti løgtingsfundur 18. januar

Løgtingslimirnir skulu ikki til arbeiðis aftur fyrr enn 18. januar, men enn er eingin skrá fastløgd

JOHN JOHANNESSEN

Formansskapur løgtingsins hevur gjørt av, at fyrsti løgtingsfundurin í ár skal haldast týsdagin 18. februar. Enn eingin klokkutið sett fyri fundin somuleiðis, sum heldur eingin dagsskrá er lýst. Hetta verður sambært heimasíðu løgtingsins tó gjørt í næstum.

Seinasti løgtingsfundurin í 1999 varð hildin týsdagin 22. desember klokkan fimm seinnapartin. Tá vóru tvey mál á dagsskránni, og var talan um tvær triðju viðgerðir.

Hesin løgtingsfundurin var ikki serliga drúgvur. Hann var lokin tíggju minuttir eftir, at hann var settur. Fundurin var nevniliga bert ein avgreiðslufundur, har atkvøtt varð við triðju viðgerð.

Málini, atkvøtt varð um, vóru tingmál nummar 14/1999, ið var uppskot til løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum og tingmál nummar 25/1999, ið var uppskot til løgtingslóg um uppihald á stovni og líknandi. Bæði málini vóru samtykt við 30 atkvøðum fyri ongari ímóti og ongari blankari.

Val av UMBOÐSRÁÐI
fyri S/F Tryggingarfelagið Føroyar

Í februar mánaði ár 2000 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Tryggingarfelagið Føroyar. Valið er galdandi í fýra ár.

Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2000.

Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum.

Allir felagsins tryggingartakarar eru limir í felagnum.

Tryggingarfelagið Føroyar er eitt sínámillum tryggingarfelag, ið teknar øll sløg av skaðatryggingum. Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi. Umboðsráðið velur nevnd felagsins. Afturat hesum velja starvsfólkini í felagnum nevndarlimir sambært ta til eina og hvørja tíð verandi lóg um tryggingarvirksemi.

Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavist 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni og øllum avgreiðslunum.

Tórshavn, tann 4. januar 2000

S/F Tryggingarfelagið Føroyar
Stjórnin

SANNSÍR - TEL 355 355

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin, P.O.Box 329, FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
Tel +298 345600, Fax+298 345601, www.trygging.fo, tf@trygging.fo